# Jólamarknaður á Viðareiði



*7. flokkur í skúlanum við Løkjuna á Viðareiði. Standandi frá vinstru: Esmar, Kristoffur, Eli, Absalon, Magni Sitandi frá vinstru: Alis, Danial*
*Mynd: Viðareiðis skúli*

**Leygardagin verður spennandi jólamarknaður í skúlanum á Viðareiði við sølubásum, ymiskum til stuttleika og kaffistovu**

JÓLAMARKNAÐUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Á marknaðinum verða 12 básar, har nógv ymiskt fæst til keyps, eitt nú jólaprýði úr ymiskum tilfari, mindir, góðgæti og klæðir.

Til stuttleika verður fiskibrunnur, tombola, pílaskjóting, amerikanskt eydnuspæl og filmur.

Eisini verður kaffistova, har til ber at keypa sær ein drekkamunn við onkrum leskiligum afturvið.

Tað er 7. flokkur í Viðareiðis skúla, sum savnar inn til eina ferð í summar. At hjálpa sær við marknaðinum hava tey fingið foreldur, lærarar og tey í 6. flokki í sving. Enn er ikki greitt, hvar ferðin í summar gongur.

Jólamarknaðurin letur upp klokkan 14 og heldur fram til klokkan 21.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum
at okkara kæri maður, pápi, verfaðir og abbi

**Pauli Joensen**
fyrrv. lærari, Skála

andaðist í heiminum 3. desember 74 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju
leygardagin kl. 13.00.

**Pálma, Una, Herálvur og Lív v/ fam.**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu,
tá okkara kæra mamma, vermamma, omma
og langomma

**Elsebeth Bech**
vanliga nevnd Dukkan

andaðist og varð jarðað.

Hjartaliga tøkk til øll somul, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað á Leiti.
Tøkk til øll, sum sendu blómur og kransar,
og til tykkum mongu, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk tøkk til Svenning av Lofti fyri góð
og lívgandi orð við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Poul, Gunnar, Tom, Regin, Eyðtór og Marjun**









MARKO ´03
SØLUSTEVNAN

Í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 6. og sunnudagin 7. desember 2003

HER BYRJA JÓLINI – ÁRSINS SØLUSTEVNA!

UNDIRHALD – JÓLABAKING FYRI BØRN – MÓTASÝNINGAR – FLOGFERÐIR AT VINNA

AWJ Foto ● Berg Motors ● Bixin ● Bókabúðin ● C-C Leður ● C-it ● El-Tænastan ● Ergo Hjálpartól
Events ● Frú S ● Harryson's ● JKH ● Klement Petersen ● La Femme ● Leikabúðin ● Malla ● My Design
Nyzac ● NSÍ ● Pílar & Skot ● Profa Gólv ● Reyni Service ● Skósølan ● Total ● Trend Floor ● Trillan

Sølustevnan er opin leygardagin frá kl. 14 til 22 og sunnudagin frá kl. 15 til 22

